# VARPIÐ




Canal+ FIRST • Leygardag 5. kl. 19.00

**»Eragon«**
Oscar-tilnevndi Stefan Fangmeier, ein sannur gandakallur við »visual effects«, er í hesum stórfilminum leikstjóri. Filmurin snýr seg um bóndasonin Eragon og dreka hansara. Tað verður teirra lagna at verja landið ímóti einum óndum kongi. Ævintýrfilmur frá 2006 við Jeremy Irons og John Malkovich.



Dr2 • Hósdag 10. kl. 21.10

**»Kærlighedens bud – forskellighed«**
Tú skal elska ymisleikan. Er tað nú ymisleikin millum mann og kvinnu, ið oyðileggur kærleikan? Høvundurin Sissel-Jo Gazan tosar við prestin Preben Kok um ymisleikan, sum motor í einum forholdi millum mann og kvinnu. Eisini um anda og tað, at fara inn í máttloysið fyri at koma víðari.



SvF • Sunnudag 6. kl. 20.00

**»Leivssjóð 18«**
Gestir í kvøld eru Ingi Gunnarsson, Petra Johnsdóttir Joensen og Óli Jacobsen, øll úr Tórshavn. Gestasolistur er Konni Kass Jacobsen. Verturin er sum vant Leivur Hansen.

**Fríggjadagur 4. apríl 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**